# Hallarvørður

Tvøroyrar býráð søkir eftir hallarvørði
til skúla- og ítróttarhøllina í Trongisvági.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at skipa fyri øllum tiltøkum í høll/forhøll og skúlagarði.
- at leiga høll/forhøll og skúlagarð út.
- at vaska høll/forhøll og skúlagarð.
- at hava umsjón við umklæðingarúmum og wc'um.
- at gera umvælingar.
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskifti eru í lagi.
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum.
- at halda reint og ruddiligt inni og uttanum høllina.

**Førleikakrøv**
Skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast tilber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til teknisku deild hjá Tvøroyar býráð á tlf. 371085

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tvøroyrar býráð, postrúm 85, 800 Tvøroyri í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 23. desember 2005.
Merkið brævbjálvan: **Hallarvørður.**

# Skrivstovulærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi innan fyrisiting til skrivstovu okkara.**

**Umsøkjarin skal:**
hava góð samstarvsevnir
hava teldukunnleika
verða nærlagdur og røkin
verða væl fyri í enskum máli
verða skrivliga væl fyri á føroyskum

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sue Philbrow tlf. 422503 ella e-mail: sue@thor.fo

Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum ummæli verður at senda til:

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

THOR

Umsóknin skal verða okkum í hendi, seinasta lagi 28.12.2005.

*P/F THOR , er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Ergoterapeutur

Vegna farloyvi verður søkt eftir ergoterapeuti til fulltíðarstarv í tíðini 1. februar 2006 til 1. februar 2007.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at veita sjúklingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi og búfólkum á Ellis- & Røktarheiminum ergoterapeutiska tænastu.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið prógv sum ergoterapeutur. Eisini verður dentur lagdur á starvsroyndir.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og verða til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Somuleiðis skulu umsøkjarar tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er fysiurgiska deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Av tí at starvið eisini fevnir um búfólkini á Ellis- & Røktarheiminum, verður arbeitt har eftir tørvi. Viðkomandi hevur beinleiðis tilvísing til yvirfysioterapeutin.

**Løn og setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroyskir Ergoterapeutar.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til yvirfysioterapeutin tlf. 37 11 33 lokal 115.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
800 Tvøroyri.

**Umsóknarfreistin er 1. januar 2006.**

# Almennir kommunustýrisfundir 2006

| | |
|---|---|
| 30. januar | 28. august |
| 27. februar | 25. september |
| 27. mars | 30. oktober |
| 24. apríl | 27. november |
| 29. mai | 11. desember |
| 26. juni | |

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10**
**FO-490 Strendur**

# Tvingsilssøla yvir útróðrarbát

Eftir áheitan frá Jóhan J. Lamhauge, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, vegna veð-og úttøkuhavara, verður hildin tvingsilssøla

**fríggjadagin, tann 3. februar 2006, kl. 13.00,**

á Dómaraskrivstovuni í Tórshavn, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-34/2005) yvir útróðrarbátin

**"M/B Norðoyingur,"**

ið Sp/f Norðoyggjafelagið er eigari av. Báturin hevur kenningsstavir OW 2073, og havnakenningsstavir KG 56. Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 4A, men dagatalið er avmarkað til 0,9 fiskidøgum.

Báturin er smíðaður úr eik, bygdur í Rødvig í Danmark í 1973 og heimahoyrandi í Klaksvík. Báturin er merktur 21.2 brt.

Báturin verður seldur við tilhoyrandi útgerð, so sum tilhoyrandi nautiskari útgerð, línuspæli og 40 stk. línum v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin, tann 20. januar 2006, kl. 13.00.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av uppskoti til tvingsilssølutreytir kunnu fáast við at venda sær til advokat Jóhan J. Lamhauge.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

Føroya fútarættur, tann 14. desember 2005

# Uppstilling

**til formansval í Føroya Postfelag.**

Sambært §.12, í lóg felagsins, verður boðað til uppstilling til formansval í Føroya Postfelag.
Uppskot skulu verða skrivstovu felagsins í hendi innan 15. januar 2006, við skrivligari váttan frá uppstillaða.
Formaður verður valdur á aðalfundi felagsins, sum verður 26. februar 2006.

Fráboðanir um uppskot verður at senda:

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15
100 Tórshavn

Ger eina góða íløgu
4 sólir - Ergoline - við øllum tilhoyri til sølu vegna annað virksemi.
Áhugað ringi tel 58 30 04